

*– Ofta hevur føroyskur politikkur verið merktur av stuttskygdum loysnum, sum ikki hava rokkið longur enn til eitt valskeið. Tí er neyðugt at seta greið mál, sum eisini duga seinni. Týdningarmikið er tó, at hendan visjónin hevur eitt fólksligt kjølfesti, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður*

# Visjónin er at skapa ta bestu vælferðina

**Mánakvøldið vóru seks landsstýrismenn og nógv embætisfólk á Bryggjuni í Keypmannahavn og løgdu Visjón 2015 fram fyri útisetar. Pallborðsluttakararnir løgdu við politiskum práti og power-point stóra orku í at skapa orðaskifti um, hvussu vit skulu teljast "millum fremstu tjóðir í 2015". Men tá orðið varð frítt, og útisetarnir vórðu spurdir, hvat skal til fyri at fáa teir heim aftur, vildu teir heldur tosa um bleyt virði sum t.d. borgararættindi hjá samkyndum og barnaansing enn gransking og gentøkni**

POLITIKKUR

*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*
*Myndir: Símun J. Hansen*

Tað gekk visjón fyri søgn. Mánakvøldið skipaði Landsstýrið fyri tí fyrsta almenna Visjónstorginum. Hetta hendi á Bryggjuni í Keypmannahavn, men hóast nakrir av teimum 13 sokallaðu grundarsteinunum undir Visjón 2015 vórðu presenteraðir, so tók kjakið eina heilt aðra vend, tá orðið varð frítt, og tey 150 fundarfólkini vórðu spurd um, hvat Føroyar skuldu bjóða teimum, um tey skuldu flyta heimaftur. Tá kyknaði kjakið um samkynd og barnaansing.

Tað venda vit aftur til.

Visjónstorgið byrjaði nevniliga við, at fundarfólkið varð bjóðað at vera vælkomið við vísukendum tónleiki hjá Una Reinert Debess og løttum ábiti, m.ø. turrum fiski og føroyskum veðraæli.

Jú, Landsstýrið var bæði væl fyrireikað og væl mannað til Visjónstorgið. Umframt at allir landsstýrismenninir uttan fiskimálaráðharrin vóru til staðar, var eisini ein riðil av embætisfólki við til fundin, men helst gjørdi tað eisini sítt til, at Norðurlandaráðið kemur saman í hesum døgum, at bert Bjørn Kalsø sat eftir í Føroyum og virkaði sum løgmaður.

## Endamálið at skapa vælferð

Eftir einum tíma við tónleiki og ábiti setti Jóannes Eidesgaard Visjónstorgið. Hetta gjørdi hann við at greiða frá, hvat Visjón 2015 veruliga er fyri nakað.

Hann segði, at ofta hevur føroyskur politikkur verið merktur av stuttskygdum loysnum, sum ikki hava rokkið longur enn til eitt valskeið. Tí er neyðugt at seta greið mál, sum eisini duga seinni. Týdningarmikið er tó, at hendan visjónin hevur eitt fólksligt kjølfesti, segði løgmaður.

At seta hava eina visjón krevur tó eina hugburðsbroyting, men hetta sæst longu aftur, m.a. í ítróttarfeløgum, sum eisini hava sett sær visjónir, segði Jóannes Eidesgaard.

Tað avgerandi við Visjón 2015 – ella krumtappurin, sum løgmaður kallaði tað – er at skapa ta bestu vælferðina fyri tann einstaka borgaran!

Hetta helt hann, at øll kundu vera samd um, uttan mun til, um tey eru sosialdemokratar ella borgarlig. Fortreytin fyri at skapa hesa vælferð er tó, at inntøkur fáast til vega, og at vinnulívið er dynamiskt. Tí skal Visjón 2015 við sínum 13 grundarsteinum vera eitt slag av manuali, sum skal takast fram til komandi samgongusamráðingar, segði Jóannes Eidesgaard. Hann viðgekk tó, at tað kundi kanska vera nakað um prátið, tá ið atfinnarar hava sagt, at endamálsorðingarnar ikki síggjast aftur í núverandi fíggjarlóg, men at hetta tó ikki átti at forða okkumi, at taka skilagóðar avgerðir nú.

## Ígongdsetan

Eftir at løgmaður hevði havt orðið, átti vinnuparturin tørn. Ella tann grundarsteinurin í visjónini, sum kallast íverksetan.

Kitty May Ellefsen, sum er forkvinna í strategibólkinum fyri hetta økið, segði m.a., at hugsanin er at gera Føroyar til ein íverksetanardepil, sum ikki bara skal vera fyri føroyingar, men øll fólk. Hon helt seg kunna vísa á, at fólk sum heild eru kreativ og dámar at atbeiða, og nevndi hon serliga virksemið innan tónleik, KT og sniðgeving. Forðingarnar eru tó nógvar. M.a. er jantelógin sterk í Føroyum. Fólk, sum eru farin á heysin, verða mett antin sum spekulantar ella ódugnalig, og hesin hugburður má broytast, helt Kitty May Ellefsen. Eisini er almenna fyrisitingin ov stirvin, eins og góð hugskot ofta drukna, av tí at privat ráðgeving – t.d. frá advokatum – er ov dýr. Tí eigur almenn íverksetararáðgeving at verða veitt á einum staði. Dømi um slíka miðsavning er t.d. samanleggingin av Menn-



*Nógv fólk vóru komin á Bryggjuna í Keypmannahavn mánakvøldið at lýða á Visjón 2015 ætlanina hjá landsstýrinum*